

Um ein mánað gevst hetta skipið at sigla rutuna Bilbao, Portsmouth and Zeebrugge.

# Lógarkrøv broytast - dýrari at sigla frá 1. januar

**Jógvan Hugo Gardar**

30.11.2014 - 14:57

Oljan.fo

Transfennica-reiðaríði hevur avgjørt at steðga við flutningsrutuni sum tey kalla "Motorways of the Sea," ið er ein farleið sjóvegis millum Bilbao, Portsmouth og Zeebrugge, skrivar shortsea.be.

Rutan bleiv sett á stovn í 2007, og áhugin at brúka hesa rutuna, í staðin fyri at koyra farm eftir landavegunum, hevur økt javn. Men nú er avgerð tikin um at steðga við henni tann 31. desember.

Orsøkin er ein lógarbroyting, tann sokallaða SECA-reglugerðin sum frá 1. januar 2015, ger at oljuútreiðslirnar hjá skipum av tí slagnum sum Transfennica brúkar, økir munandi. Tað er sokallaða svovuldirektivið sum nú verður sett í verk.

Metingar siga at umleið 50 prosent av stóru flutningsbilunum fara at velja landavegirnar í staðin fyri sjóvegin, tá tað verður bíligari at koyra